**Nr. 78/2014**

**Kristina Háfoss**
**løgtingskvinna**

**Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52a**

**Fyrispurningur um Bústaðir og átøk at fáa til vega bíligar leigubústaðir, settur Jørgen Niclasen, landsstýrismanni (at svara skrivliga eftir TS § 52a)**

1. Hvussu nógvar leiguíbúðir kann Bústaðir útvega afturat við verandi gjaldføri?
2. Hvørjar av ætlaðu bústaðarverkætlanunum hjá Bústøðum kunnu gerast veruleiki við verandi gjaldføri?
3. Hvørjar av ætlaðu bústaðarverkætlanunum hjá Bústøðum gerast væntandi ikki veruleiki, um Bústaðir ikki fær lántøku og meira gjaldføri?
4. Hví hevur landsstýrismaðurin ikki, eitt nú í kunngerð, málrættað verkætlanirnar hjá Bústøðum til bíligar leigubústaðir, lestraríbúðir og bústaðir til fólk við serligum avbjóðingum?
5. Fer landsstýrismaðurin at taka stig til, at Bústaðir í størri mun skal leggja seg eftir bíligum leigubústøðum, lestraríbúðum og bústøðum til fólk við serligum avbjóðingum?
6. Fer landsstýrismaðurin at virka fyri, at Bústaðir fær møguleika at taka lán og økja gjaldførið fyri at fremja fleiri bústaðarverkætlanir í verki?
7. Um ja, nær? Um nei, hví?
8. Hvussu leingi hevur landsstýrismaðurin vitað, at Bústaðir hevur tørv á meira gjaldføri fyri at fáa framt allar tær ætlaðu bústaðarverkætlanirnar í verki?

**Viðmerkingar**

Øll skulu hava møguleika at útvega sær ein bústað. Hetta er ein grundleggjandi rættur. Men hetta er ikki ein møguleiki fyri øll í Føroyum, tí útboðið av bíligum leigubústøðum er sera avmarkað.

Tað var tí eitt stórt framstig, tá tað í 2011 eydnaðist Tjóðveldi at fáa meiriluta – saman við minnilutasamgonguni – fyri, at broyta lóggávuna fyri Húsalánsgrunnin (nú Bústaðir), soleiðis at hesin fekk heimild til at víðka virksemi sítt til eitt nú eisini at fevna um leigubústaðir.

Vónin var, at nú fór verulig ferð at koma á at fáa bygt bíligar leigubústaðir, bústaðir til fólk við serligum avbjóðingum, lestraríbúðir v.m.

Endamálið hjá Bústøðum er eisini í lógini: “at virka fyri, at øll í Føroyum skulu hava møguleika fyri at útvega sær ein bústað”. Hesum hava øll ikki møguleika fyri í dag.

Síðan lógin fyri Bústaðir varð broytt í 2011, hevur ein røð av stórfingnum ætlanum um bústaðarverkætlanir sæð dagsins ljós. Nakrar eru eisini framdar í verki. Tær størru verkætlanirnar eru tó ikki komnar á mál enn, og eru nógvar enn bara á skriviborðinum. Millum nógvu ætlaðu verkætlanirnar eru eisini sokallaðar marglætisíbúðir. Hetta hevur undrað, tí í politisku skipanini hevur ikki verið hugsanin, at Bústaðir

skuldi fara inn á tann partin av bústaðarmarknaðinum, ið tann privati marknaðurin eigur at megna at lyfta sjálvur.

Hinvegin er stórur mangul uppá bíligar leigubústaðir til tey, ið ikki hava ráð at keypa sær hús og/ella leiga til verandi kostnað. Eisini er tørvur á lestraríbúðum og fleiri bústøðum til fólk við serligum avbjóðingum.

Vónin var, at Bústaðir kundi gerast eitt amboð at røkka hesum málum, men nú frættist, at tað ikki verður møguligt at fremja ætlaðu bústaðarverkætlanirnar við verandi gjaldføri hjá Bústøðum. Neyðugt verður sostatt at heimila Bústøðum at taka lán fyri at økja gjaldførið, um haldast skal áfram við øllum bústaðarætlanunum.

Fyri at fáa lýst málið, verða hesir spurningar settir landsstýrismanninum í fíggjarmálum.

**Á Løgtingi, 17. apríl 2015**

Kristina Háfoss

**Á Løgtingi, . 2015**

navn